


**Tíðindaskriv**

**Hjálp Afrika – eitt lív ein vón**

**Innsavningin til HIV/AIDS-rakt børn í Uganda gav 99.000 krónur**

**Seinastu viku skipaðu samkomurnar í Kristnastovu í Keypmannahavn og Lívdini í Hoyvík fyri landsumfatandi innsavning til frama fyri børn, ið eru rakt av HIV/AIDS. Átakið var sera væl eydnað.**

Átakið "Hjálp Afrika" er endað og hevur verið stak væleydnað. Alt hevur gingið væl, nógv fólk hava verið til tiltøkini og fitt av peningi er komin inn. Higartil eru 97.000 krónur komnar inn.

Hæddarpunktið við átakinum var í fríggjakvøldið, tá Kristnastova og Lívdin skipaðu fyri tiltøkum í ávikavist Føroyahúsinum í Keypmannahavn og Oasuni í Hoyvík. Hesi tiltøk vórðu væl vitjað og eydnaðust væl. Í Føroyahúsinum vóru umleið 90 fólk og í Oasuni vóru umleið 250 fólk.

Tað er okkara greiða fatan at mangir føroyingar eru vorðnir meira tilvitaðir um ræðuliga støðuna í Afrika og hava fingið íblástur og vón um at støðan kann broytast við einum felags innsatsi frá okkum øllum.

42 milliónir fólk hava HIV/AIDS í dag, av teimum búgva 63% í Afrika. Fýra av fimm smittaðum í Afrika eru kvinnur. Av tí at ein stórur partur av kvinnunum hvørki dugir at lesa ella skriva og ikki hevur somu atgongd til útbúgving sum menn, gerast tær tíðliga við barn. Av 109.200 kvinnum, ið gerast við barn hvørt ár í Uganda, verða 29.484 børn fødd við smittuni.
Foreldraleys børn verða vanrøkt, fáa ikki neyðuga læknahjálp og uppliva kenslulig trauma orsakað av sjúku, einsemi, sorg og sakni.

Peningurin, sum er savnaður í Føroyum, fer til eitt barnaheim í Uganda, sum liggur í Kasese økinum.




Heimið Jajja, Kampala, hevur til endamáls at minka um árinið av HIV & AIDS á børn við at veita læknaligar metingar, umsorgan og viðgerð av sjúkum børnum. Eisini vera sjúkrahjálparar og onnur hjálparfólk upplærd til at veita AIDS sjúklingum læknahjálp.
Heimið Jajja varð innstillað til ”best practice” av UNAIDS í 2003.

Málið var at savna 76.000 krónur, so raksturin av heiminum í 2007 kundi fíggjast av føroyingum.
Málið er rokkið, og tær 76.000 krónurnar vera beinanvegin fluttar Samaritan's Purse, sum syrgir fyri at peningurin kemur á rætta stað skjótast gjørligt.
Samstundis fara vit beinanvegin at tosa við Samaritan's Purse um, hvussu restin av peninginum kann brúkast. Talan kann vera um eitt nú at keypa leikur, tak til bygningin, meira heilivág, súklur, køksútgerð ella fleiri starvsfólk, so fleiri børn enn tey 200, sum dagliga eru á heiminum, kunnu verða syrgd fyri.

Samkomurnar í Kristnastovu og Lívdini takka øllum føroyingum fyri andaligan og peningaligan stuðul. Má Harrin signa tykkum ríkliga.